# Trygvi skal venja B68

**Í gjárkvøldið hevði Trygvi Mortensen fyrstu ferð ábyrgdina av venjingini á Svangaskarði, har málið hjá honum og felagnum er at sleppa av aftasta plássinum**

B68 VENJARIN
*Jóannes Hansen*

Toftamenn hava fingið nýggjan mann at hava ábyrgdina av liðnum í bestu deildini. Nýggjur venjari hjá B68 er Trygvi Mortensen, sum tekur við eftir Petur Mohr, ið segði seg frá í vikuskiftinum. Trygvi hevur higartil í ár verið at sæð á NSÍ beinkinum, har hann hevur veitt Jógvani Martin Olsen eina hjálpandi hond. Jógvan Martin er toftamaður og fyrrverandi B68 spælari og eisini B68 venjari. Hann býr á Toftum, og hann er nú venjari í Runavík. Trygvi Mortensen er úr Runavík, har hann býr, og hann er fyrrverandi NSÍ spælari og venjari. Nú er hann venjari á Toftum!

Trygvi Mortensen er 37 ára gamalur. Hann hevur tær venjaraútbúgvingar, sum møguleiki hevur verið at tikið í Føroyum.

Í tveimum umførum hevur Trygvi verið venjari hjá NSÍ. Fyrra ferðin var í 1992, tá ið hann bara var 25 ára gamalur. Ta ferðina tók hann ábyrgdina, eftir at Bobby Bolton var farin úr starvinum. Seinna ferðin var í 1999. Ta ferðina tók hann venjarastarvið á seg, eftir at Milan Cimburovic var farin úr starvinum. Trygvi var eisini venjari hjá B68 í 2000.

Fyrsta uppgávan hjá nýggja B68 venjaranum verður á heimavølli nú sunnudagin. Tá skal B68 í 6. umfarinum spæla ímóti VB. Enn hevur tað ikki eydnast B68 at fáa nakað stig í hesum kappingarárinum. Tískil er setningurin hjá Trygva Mortensen og hansara monnum at skava so mikið at stigum saman, at B68 kann sleppa av aftasta plássinum og harvið undan niðurflytingini. B68 hevur verið fast inventar í bestu deildini, síðani teir í 1980 fluttu upp úr 2. deild.

# Julian og teir næstovastir

**Fyrrverandi B68 málverjin var við yvirlutan, tá ið hann og hinir í Grindavík høvdu vitjan av gomlu liðfeløgunum, sum nú eru í Fram**

ÍSLAND
*Jóannes Hansen*

ÍA á Akranesi, sum Julian Johnsson spælir við, er eftir fýra tey fyrstu umførini í íslendsku landskappingini næstovast. Týskvøldið vunnu teir á heimavølli 2-1 ímóti KA av Akureyri. Sigursmálið skoraði ÍA upp á brotsspark í 2. hálvleiki. Felagið av Akureyri er næstniðast á støðutalvuni.

Meðan landsliðið tuskaði niðri í Sveis og royndi at avmarka tapið ímóti hollendsku heimsstjørnunum so nógv, sum tað bar til, vóru landsliðsspælararnir Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen við Fram í Grindavík. Har var gamli liðfelagin hjá teimum, Albert Sævarsson, í málinum hjá heimaliðnum.

Grindavík legði ógvuliga sannførandi fyri. Í steðginum vóru teir frammanfyri 3-0. Íslendskir fjølmiðlar vita at siga, at tað rætt og slætt einki var um liðið hjá Ion Geolgau í 1. hálvleiki. Eftir steðgin hilnaðist tað betur hjá Fram. Teir minkaðu um munin til bæði 3-1 og 3-2, men teimum eydnaðist ikki at fáa stig.

Eftir at tað í tveimum teimum fyrstu umførunum gekk strúkandi hjá Fram, er tað aftur vorðið gerandisdagur. Fram er fjórði niðast við fýra stigum. Teir eru undir liðini á meistaraliðnum KR, sum spældi 2-2 í Vestmannaoyggjunum.

Úrslitið var merkisvert. KR var á odda 2-0, áðrenn fyrra umfarið var hálvrunnið. Tá varð ein av heimamonnunum rikin av vøllinum. Men ÍBV stríddist víðari. Undan steðginum minkaðu teir um munin, og í 2. hálvleiki eydnaðist teimum at javna. Útjavnandi málið skoraði landsliðsmálverjin, Birkir Kristinsson, upp á brotsspark.

Fylkir vann toppdystin 2-0 á Keflavík, sum er á triðja plássinum. Fylkir er ovast. Víkingur fekk fyrsta stigið, tá ið teir á heimavølli fingu 1-1 ímóti FH.

Fimta umfarið verður á skránni mánadagin 7. juni. Tá verður spælt soleiðis: FH-ÍBV, Fram-Fylkir, KA-Grindavík og Keflavík-Víkingur. Síðsti dysturin í fimta umfarinum verður spældur mikukvøldið 9. juni. Hann verður millum KR og ÍA.



*Tað eydnaðist ikki hjá Fróða og Hans Fróða at fáa stig, tá teir vitjaðu fyrrverandi liðfelaganum í Grindavík*

## Íslendska Landsbankadeildin

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fylkir | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 6 | 1 | 5 | 10 |
| 2 ÍA | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 6 | 5 | 1 | 8 |
| 3 Keflavík | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 7 |
| 4 ÍBV | 5 | 1 | - | 4 | - | 0 | 5 | 4 | 1 | 7 |
| 5 FH | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 3 | 3 | 0 | 5 |
| 6 Grindavík | 4 | 1 | - | 2 | - | 1 | 4 | 5 | -1 | 5 |
| 7 Fram | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 6 | 6 | 0 | 4 |
| 8 KR | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 5 | 7 | -2 | 4 |
| 9 KA | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 3 | 5 | -2 | 3 |
| 10 Víkingur R | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 2 | 7 | -5 | 1 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (ÍA), Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen (Fram)

## ÍSB aftur á ferð

Í gjár fór eitt lið av ítróttarfólki hjá ÍSB til Danmarkar. Leiðin gongur til Norður-Jútland, har teir sjey íðkararnir skulu taka lut í einari kapping, sum verður í Aalborg frá í dag og fram til sunnudagin.

Tey sjey, sum skulu umboða Føroyar í kappingini, eru Maiken Olsen, Júst í Túni og Tórur Hjalt, sum øll luttaka í rennikappingum, meðan Halla Poulsen, Eydis á Løgmansbø, Magnus V. Olsen og Símun Petur Zachariasen eru við í svimjikappingunum. Umframtey sjey ítróttarfólkini eru fýra onnur fólk við í ferðalagnum. Tey eru Jón Eli Jacobsen, sum er venjari í frælsum ítrótti, Tóra Hansen, ið er svimjivenjari, Haldóra Holm er hjálparfólk, og Sonni Djurhuus er ferðaleiðari.

Kappingin, ið føroyingarnir skulu luttaka í, eitur SONG, ið stendur fyri Special Olympics Nordic Games. Føroyska ferðaliðið verður heima aftur mánadagin.

**tn**

# Ikki vist at NSÍ fær Esbjerg

Tað verður møguliga ikki Esbjerg, men eitt annað danskt felag, sum NSÍ skal dystast við í Intertoto Cup seinni í hesum mánaðinum. Esbjerg vann Fair Play kappingina í Danmark, og Danmark er eisini millum tey londini, sum skikka sær best í Europa, og tí fær Danmark møguliga eitt pláss afturat í UEFA Cup kappingini.

UEFA tillutar trý pláss í eini Fair Play kapping, og Svøríki hevur fingið eitt pláss, tí landið skikkar sær best av øllum teimum europeisku londunum. Síðani verður lutakast millum 11 onnur lond um tvey tey seinastu plássini í UEFA Cup, og skuldi luturin fallið á Danmark, so verður tað Esbjerg, sum skal luttaka.

Fer Esbjerg við í UEFA Cup, so verður tað helst OB, sum skal spæla ímóti NSÍ í Intertoto Cup.

Lutakastið hjá UEFA um Fair-Play plássini verður týsdagin.

**-jm**



# Gleðir seg til vitjanina

**Fyrst í juli mánaði koma Todi Jónsson og FCK til Føroya, og sjálvur sigur Klaksvíkingurin, at hetta er ein vitjan, sum hann gleðir seg til**

FCK-VITJAN
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Umframt boðini um, at Todi Jónsson nú aftur er tøkur hjá føroyska fótbóltslandsliðnum, snúi tíðindafundurin hósdagin seg eisini um komandi føroyaferðina hjá FCK.

Sum vit áður hava nevnt, so er Todi Jónsson fegin um, at hann nú fær møguleikan at vísa liðfeløgunum sínum heimlandið, og hann var eisini fegin um, at leiðslan í FCK soleiðis hevur givið honum eitt stórt herðaklapp.

– Eg havi nú verið 11 ár í donskum fótbólti. Tá eg fór niður, vildi eg bara síggja, hvussu langt eg kundi røkka, og í veruleikanum hevði eg als ikki roknað við, at eg skuldi koma so langt, sum eg eri komin, segði nýkosni greipuvinnarin.

Av hesum árunum hava tey sjey verið í FCK, og sjálvur havi eg altíð ynskt, at eg kundi koma við liðnum til Føroya. Tann møguleikan hava eg so fingið, og eg gleði meg til ferðina.

Spurdur, hvørt tað var trupult at fáa leiðsluna í FCK við upp á hugskotið um Føroya-ferðina, segði Todi, at hetta var eitt lyfti, sum hann hevur fingið frá leiðsluni, og tí var sum so eingin trupulleiki í hesum.

– Sjálvur kenni eg tað í øllum førum sum eitt herðaklapp fyri tað, sum eg havi gjørt fyri felagið. Onkur hevur hug til at kalla tað fyri ein testemonial, og tað veit eg ikki, um tað er. Men í øllum førum eri eg fegin um, at teir soleiðis sýna mær, at teir eisini hava verið glaðir fyri meg, segði Todi.

### Í størsta álvara

Liðið hjá FCK kemur annars til Føroya 4. juli, og longu dagin eftir er fyrsti dysturin á skránni. Hesin verður í Klaksvík, og og eftir at bara venjing er á skránni ein dag, verður so dystur móti HB á Tórsvølli tann 6. juli.

Og Todi leggur dent á, at talan avgjørt ikki bara verður um eina summarferð hjá liðnum.

– Hetta er ein uppgáva, sum verður tikin í størsta álvara. Fáar vikur seinni skulu vit spæla undankappingardyst til Champions League, og tá verður roknað við, at mótstøðan er á sama støði, sum frá eitt nú HB og KÍ. Tí verður tað við sterkastu manning, at vit koma til dystin, tó at Magnus Kihlstedt er bundin at uppgávum við svenska landsliðnum.

So er spurningurin bara, um Todi sjálvur eisini verður á liðnum, ella um hann má síggja aðrar byrja í álopinum, men hesum tóktist hann ikki bera ótta fyri.

– Eg skal ikki siga við vissu, at eg byrji inni í báðum dystunum, men eg rokni tó við, at eg sleppi at spæla.

# Dygd er altíð vælkomin

**Tá Henrik Larsen gjørdist landsliðsvenjari, segði hann seg vilja hava Toda aftur á landsliðið. Nú er ynskið runnið út, og tað tykist venjarin vera fegin um**

TODI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað var ein fegin Henrik Larsen, sum vit høvdu á orði, tá vit hósdagin fregnaðust um, hvussu hann sær støðuna við landsliðnum, nú fremsti føroyski fótbóltsleikarin aftur sigur seg vera tøkan til hetta.

– Tað eri eg sjálvandi fegin um. Ikki minst, um hann megnar at halda seg í góðari venjing og skaðafrían. Sum landsliðsvenjari er tað altíð gleðiligt, um tú hevur góðar leikarar at taka av.

– Og fyri liðið kann tað bara vera gott, at ein somikið sterkur leikari aftur er tøkur. Við síni kropsligu og teknisku styrki, eins og skjótleikanum, er Todi eisini ein leikari, sum kann hvessa okkum álopið, har vit kanska hava mangla tað seinasta pettið í nøkrum av undanfarnu dystunum.

*Og at Todi nú er við aftur. Fer tað at broyta nakað í føroyska spælistílinum?*

– Tað rokni eg ikki við. Eg ætli so framvegis at spæla við eini 4-4-2 skipan, men tað er greitt, at Todi fer at geva okkum nýggjar møguleikar. Hann er jú ein vandamikil leikari, sum ikki skal nýta tað nógva plássið, so tað er væl hugsandi, at mótstøðumenninir nú mugu ansa betri eftir.

### Hava leikt saman

Sum leikari hevur Henrik Larsen í tveimum umførum verið liðfelagi við Toda. Bæði í Lyngby og í FCK, men hóast hetta, so sær venjarin ikki nakran trupulleika í, at teir nú hava leiklut sum ávíkavist venjari og leikari.

– Tað er jú ikki fyrstu ferð, at tað hendir, og í FCK var eg so eisini hjálparvenjari, eftir at eg gavst sum leikari, so tað haldi eg ikki, at tú skal gera til nakran trupulleika. Eg kann jú heldur ikki bíða við at gerast venjari, til allir mínir fyrrverandi liðfelagir eru givnir at spæla, sigur stóri føroyski landsliðsvenjarin at enda.

Og so kann kanska leggjast afturat, at nú er tað bara lyftið um tey sjey stigini, sum er eftir hjá Henrik. Higartil hevur hann umlagt spælskipanina og meira ella minni gjøgnumført eitt ættarliðsskifti á liðnum. Í gjár fekk hann so Toda Jónsson aftur á liðið, og so er spurningurin, um hetta er tað, sum skal til, fyri at fáa neyðugu stigini í skjáttuna. Tað fer komandi HM-undankappingini at vísa.




NORÐURLANDAHÚSIÐ TILTØK APRÍL 2004

SKRÁIN VIKA 23–24

Fríggjadagur 04. juni
Kl. 16.00 Felagið fyri Hoyribrekað í Føroyum (FO), evnisdagur
Nordisk Høreskadedes Samarbejdskomité
Kl. 22.00 Mentanarnáttin 2004 - Summarframsýningin 2004 letur upp (FO)
Luttakandi listafólk eru: Aggi Ásgeirsdóttir, myndlist, Anker Mortensen, grafik/myndlist, Annie Heinesen, arkitektur/foto, Jógvan Biskopstø grafik/myndlist, Martin Nolsøe, videoinstallatión, Svanhild Strøm, tekstil/installatión, Tummas Jákup Thomsen, grafik/installatión og Vigdis Petersen skulptur og glas.

Leygardagur 05. juni Grundlógardagur - húsið er stongt!

Mikudagur 09. juni
Kl. 09.00 Prestafundur (FO), fyrireikari er Marjun Bæk.

Hósdagur 10. juni
Prestafundur, framhald

Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00

NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo



**Leiðari til fíggjardeildina**

Søkt verður eftir fíggjarleiðara til høvuðsdeildina hjá Føroya Shell í Tórshavn.

Tá verandi fíggjarleiðari eftir gott 17 ár í starvinum eftir egnum ynski hevur valt at taka við øðrum uppgávum í fyritøkuni, hava vit brúk fyri einum nýggjum leiðara til fíggjardeildina.

**Starvið**:
Talan er um eitt sjálvstøðugt og áhugavert starv í einum spennandi umhvørvi. Leiðarin hevur alla ábyrdina av fíggjardeildini herundir
· ger av ávegis- og ársroknskapi
· rapportering til útlendska móðurfelagið
· fíggjarætlanum o.t.
· dagligari leiðslu og skipan av deildini
· roknskaparlig umsiting og samskifti við avgreiðslurnar og egnar støðir kring landið.

Leiðarin er partur av leiðslubólkinum við beinleiðis tilvísing til stjóran.

**Førleikakrøv**:
Til starvið krevst holl ástøðilig útbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving. Dentur verður lagdur á leiðaraevnir og royndir, umframt at tú ert arbeiðssamur og dugir væl at samskifta. Góður kunnleiki í enskum er neyðugur.

**Vit bjóða**:
Eitt fjølbroytt, spennandi og sjálvstøðugt starv við góðum møguleikum fyri persónligari menning, men samstundis eitt krevjandi starv. Vit hava góðar arbeiðsumstøður og trygg starvsviðurskifti. Góð løn í samsvar við útbúgving og royndir. Eftirlønarskipan er knýtt at starvinum.

**Umsóknir**:
Skrivligar umsóknir skulu verða innlatnar í seinasta lagi mánadagin 21. juni og skulu sendast til P/F Rasmussen & Weihe, statsautoriserað grannskoðarafelag, á Glaðsheyggi, FO-100 Tórshavn, telefon nr 351700, har nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Jóannes Olsen ella Klaus Rasmussen. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

www.shell.fo